# Føroyakortið til GPS-arar

**Í summar kunnu vit bjóða teimum sum koma til Føroyar at vitja eina nýggja GPS-navigatiónsskipan við øllum Føroyakortinum, bæði til koyring á føroysku vegunum og til gongutúrar í haganum. Tað er ráðgevingarstovan Munin í Havn, sum hevur ment hesa skipan**

TØKNI
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*



*Verkfrøðingarnir John Zachariassen og Bogi Jacobsen frá ráðgevingarstovuni Munin*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Fyri tey sum leingjast eftir at kunna nýta GPS-navigatiónsskipan til koyring í Føroyum, og til gongutúrar í haganum, kemur Munin at gera munin, tá teir koma á marknaðin við einum korti við innbygdum Føroyakorti at brúka til navigatiónsskip anir.

GPS-navigatiónsskipan er eisini alt meira vanlig í bilum, eisini her hjá okkum. Men higartil hava vit bert kunna brúkt navigatiónsskipanir, tá vit ferðast uttanlands, og tey sum koma til Føroyar við bili við GPS-navigatiónsskipan hava ongan møguleika at brúka skipanina, tí einki kort er yvir føroysku vegirnar.

Nú sær út til at vend kemur í, tí nakrir idealistar á ráðgevingarstovuni Munin í Havn eru komnir væl áleiðis við at einum føroyakorti til GPS-navigatiónsskipanir. Verkfrøðingarnir hjá Munin, Bogi Jacobsen og John Zachariassen, siga, at longu nú til jólar fara teir at bjóða ein sonevndan jólapakka við einum berbarum Garmin GPS-ara við innbygdum Føroyakorti.

Í vár verður ein skipan klár við føroyska veganetinum. Teir hava alla tøknina og tey kort sum skulu til fyra at menna eina slíka skipan, sum teir í løtuni eru í ferð við at royndarkoyra. Skipanin virkar longu í Vestmanna og á Argjum, har hon hevur verið royndarkoyrd.

Ráðgevingarstovan MUNIN veitir tænastur innan digitala kortlegging, herundir eisini uppmáting, við hjálp av GIS-skipanum. Fyritøkan heldur til á Dalavegi 47 í Havn. GPS stendur fyri (Global Positioning System). Meira upplýsingar um Munin eru at finna á: www.munin.fo.

# Auto Service á Lívsstílsstevnuni




*Myndir: Heðin Weihe*



Á Lívsstílsstevnuni í høllini á Hálsi leygardagin 25. og sunnudagin 26. oktober, hevði bilasølan Auto Service ein sermerktan bil, ein ljósareyðan Peugeot 107 Womans Edition. Eisini varð skipað fyri eini annarleiðis mótaframsýning á básinum. Mikukvøldið 26. november skipar Auto Service fyri bilkvøldi fyri kvinnur.




*Jens Eli Albinus er settur í starv á mekaniska verkstaðnum, og Jógvan Johansen tekur sær av rustviðgerðini*
*Mynd: Bilrøkt*

# Bilrøkt víðkar virksemið

Sp/f Bilrøkt í Stiðjagøtu í Havn víðkar nú sína tænastu til eisini at umfata rustviðgerð av bilum.

Í sambandi við at Bilrøkt um tríggjar vikur fer undir rustviðgerð av nýggjum og gomlum bilum, er Jógvan Johansen settur í starv hjá fyritøkuni. Jógvan hevur verið í Danmark á skeiði hjá SUVO Anti-Rust, sum Bilrøkt nú umboða í Føroyum. SUVO Anti-Rust støðir eru um alt Danmark.

Á mekaniska verkstaðnum er Jens Eli Albinus settur í starv. Jens Eli er útbúgvin bilmekanikari, og hann hevur starvast bæði sum sjálvstøðugur og á Shellstøðini á Frælsinum í Havn í mong ár, verður sagt í tíðindaskrivi frá Sp/f Bilrøkt.